NSÍ-VB:

# Ian skal styrkja trilvandi NSÍ

**Teir báðir, sum í morgin fara at verja málini í Runavík, hava tilsaman verið í fremstu røð í 36 ár!**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Jón Pauli Olsen hevur vant dúgliga í ár, og væntandi verður hann við á VB-liðnum í Runavík*

Higartil hevur spælið ikki verið tað, sum teir í felagnum fegnir vilja, at tað skal vera. Tað eru teir í NSÍ samdir í. Jens Martin Knudsen, sum hevur verið málverji í fremstu røð síðani í 1985, hevur verið álitið. Úti á vøllinum hevur tað knirkað í øllum røðunum í steypakappingini. Í miðverjuni royndi venjarin ímóti FS Vágum Áka L. Hansen í staðin fyri Messias Perreira, og tað hava eisini verið fleiri útskiftingar longri frammi á vøllinum.

Fyri nakað síðani so at siga lýsti Ian Højgaard seg til sølu her á síðunum, eftir at hann hevði gjørt av at gevast í Vejle. Nú er hann aftur í NSÍ, og hann verður í hópinum í morgin. Tað verður vónað, at hann skal vera við til at finna melodiin, sum heilt sjónskt hevur verið saknaður í spælinum í bólkaumfarinum í steypakappingini.

Tað kemur væl við hjá NSÍ, at Ian Højgaard er tøkur. Ætlanin var, at Aleksandar Jovevic, sum spældi á Skála í fjør, og sum hevur bíðað eftir spæliloyvinum, skuldi styrkja um miðvøllin. Tað verður av ongum. Undir venjing týskvøldið varð hann skaddur í lærkrikanum, og skaðin hevur hildið honum burtur frá venjingini síðani tá.

Jústinus Hansen og Brynjolvur Nielsen vóru hóskvøldið rættuliga ivasamir. Í gjár kvøldið skuldi gerast av, um teir skulu spæla við í morgin ella ikki.

Miðvallarin Rúni Rasmussen er fluttur úr NSÍ og yvir á Skála, har hann slapp framat fram ímóti endanum, tá ið Skála vann á HB.

### Okkurt ivamál

Vágbingar taptu í fjør 4–0 í Runavík. Ta ferðina skoraði Sonni L. Petersen, sum nú er í EB/Streymi, øll málini hjá NSÍ. VB hevur ikki vunnið í Runavík síðani í 1997, tá ið úrslitið var 4–1.

Tað er greitt, at Dan Djurhuus, sum varð vístur av vøllinum, tá ið VB leygardagin legði rygg til 6–0 tap í Gundadali ímóti HB, er leikbannaður ímóti NSÍ. Veteranurin Jón Pauli Olsen hevur vant dúgliga í ár. Hann hevur verið skaddur eitt skifti, men í hesi vikuni hevur hann aftur verið til venjingar.

Aftasti skansin hjá VB er Bjarni Johansen. Á sama hátt sum NSÍ málverjin, so er hann ikki nakar ársungi í føroyskum fótbólti. Fyrsta ferðin, hann var á besta VB liðnum í landskappingardysti, var í 1987. Í stevnudystinum var úrslitið 1–1.

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 25.04 | KÍ-B68 | Dagfinn Olsen |
| 25.04 | GÍ-ÍF | Petur Skarðenni |
| 25.04 | NSÍ-VB | Lassin Isaksen |
| 25.04 | B36-EB/S | Páll Augustinussen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 24.04 | B36-KÍ | Hans F. Hansen |
| 24.04 | Sumba-VB | Petur Hansen Joensen |
| 24.04 | FSV-Royn | Rúni Gaardbo |
| 24.04 | LÍF-AB | Regin Egholm |
| 24.04 | TB-B71 | Jens Petur Brattalíð |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 25.04 | SÍ-B68 | Suni Johansen |
| 25.04 | GÍ-ÍF | Magni Hansen |
| 25.04 | Skála-HB | Edvard Højgaard |
| 25.04 | NSÍ-TB | Jan Gardar |
| 25.04 | Fram-EB/S | Ransin N. Djurhuus |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 25.04 | GÍ/B68-B36 | Jan á Líðarenda |
| 25.04 | FSV-Sumba | Kristian av Kák |
| 25.04 | KÍ-EB/S | Jákup M. Kjeld |

**Atlantic Cup**

| | | |
|---|---|---|
| 24.04 | HB-KR | Niklas á Líðarenda |

HB-KR:

# Skulu vaska Skálabotnin av sær

**HB skal leygardagin reisa seg, eftir at snópisliga tapið mikudagin, og tó at tað ikki standa stig upp á spæl, so tykjast føroyameistaranrir at leggja nógv í dystin**

ATLANTIC CUP
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Flestum kunnugt, so fekk HB alt annað enn eina ynskibyrjan, tá teir mikudagin vitjaðu hjá Skála í ársins fyrsta landskappingardysti.

Tann dysturin var framskundaður, tí HB skal spæla móti íslendsku meistarunum úr KR í sonevndu Atlantic Cup kappingini, og hóast tað kanska kann tykjast tungt at spæla longu aftur leygardagin, so munnu leikararnir sjálvir fegnast um hetta.

Í øllum førum heldur liðskiparin á liðnum, Rúni Nolsøe, at hetta er eitt gott høvi hjá leikarunum at vaska avrikið á Skála av sær.

- Tað haldi eg gott, at mann kann siga. Sjálvandi er hetta ikki ein dystur, har nakað stig stendur upp á spæl, men fyri okkara viðkomandi er talan fyrst og fremst um eina fína styrkisroynd, eins og vit kunnu brúka dystin til at koma víðari uppá. Hjá okkum ræður snøgt sagt um at fáa nakað positivt burturúr dystinum og ikki minst at fáa spæligleðina aftur. Og so vilja vit fegnir hava eitt gott úrslit eisini.

Um talan verður um broytingar í mun til dystin mikukvøldið, dugdi liðskiparin als ikki at siga, tá vit tosaðu við hann. HB-leikararnir høvdu frí frá venjing hóskvøldið, og tað einasta, sum bar til at staðfesta, var at skaðastøðan er óbroytt. Tað vil siga, at Bárður Johannesen og Hans á Lag framvegis ikki eru tøkir, men at venjarin í aðrar mátar fær blandað kortini soleiðis, sum honum lystir.



*- Hjá okkum ræður snøgt sagt um at fáa nakað positivt burturúr dystinum og ikki minst at fáa spæligleðina aftur, sigur liðskiparin hjá HB, nú teir fyrireika seg til dystin móti íslendska meistaraliðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Hava møguleikan

Sjálvur var Rúni við á HB liðnum, sum í fjør vitjaði hjá KR í tilsvarandi dystinum ta árið, og tó at íslendsku meistararnir vunnu tann dystin 2-0, so heldur hann ikki, at munurin var tann heilt stóri. Og hann leggur dent á, at hóast talan er um vinardyst, so løgdu báðir partar nógv fyri.

- Tað var als ikki soleiðis, at liðini bara hugnaðu sær á vøllinum. Sjálvandi er tað tíðliga upp á árið, men kortini helt eg, at ferðin var rættiliga høg. Og vit høvdu so sanniliga okkara møguleikar. Áðrenn teir skora, hava vit einar tveir opnar møguleikar, so heilt uttan møguleika eru vit als ikki.

- Nú kenni eg ikki nakað til, hvussu teirra lið sær út, men eg gangi bara út frá, at teir hava roynt at hildið upp á fólkið, nú teir hava verið meistarar tvey ár á rað, so styrkin er helst á leið hin sama, sum seinast. So er spurningurin bara, hvussu vit eru fyri, sigur HB-liðskiparin at enda.

### Vinarlag

Og íslendsku miðlarnir tykjast ikki geva Rúna stórvegis hjálp í so máta.

Einasta, sum er at finna, er á heimasíðuni hjá KR, har sagt verður, at felagið skipar fyri útferð til dystin móti HB, og at pláss er fyri 20 áskoðarum á ferðini. Hvørt tað hevur eydnast at fylt flogfarið, stendur einki um á heimasíðuni.

Annars hevur Tórshavnar Býráð eisini átikið sær sín lut í dystinum. Tórshavn og Reykjavík eru vinarbýir, og tí fer Býráðið eftir dystin at hava okkurt ábit fyri leikarunum hjá bæði HB og KR, og verður hetta í Listaskálanum.

Høng Gymnasium og HF

**Á Høng Gymnasium hendur tað eisini naka, tá ið klokkan hevður ringt út**



Gymnasium og HF – skeið við kostdeild.
Ring ella hygg á heimasíðu okkara.

www.hoeng-gymhf.dk
tlf.:+45 5885 2636

HØNG GYMNASIUM · HF-KURSUS OG EFTERSKOLE



B36-EB/S:

# Eldra B36-liðið úti

**Fleiri av teimum, sum seinnu árini hava myndað landsliðshópin, eru ikki tøkir hjá B36 sunnudagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Ronnie Samuelsen var í fjør liðskipari hjá EB/Streymi, men nú skal víkamaðurin aftur royna seg í B36, og í fyrsta landskappingardystinum eru tað gomlu liðfelagarnir, sum vitja*

Í B36 hava tey í vetur gjørt nógv burturúr, at hóast liðið hevur mist onkrar heilt stórar profilar, so er hópurin í ár væl breiðari, enn hann var tað í fjør. Nakað sum skuldi borgað fyri, at liðið í størri mun er ført fyri at standa seg ímóti fráveru av stuðulsleikarum, og longu fyrsta umfarið skal liðið upp til eitt slag av próvtøku í so máta.

### Landsliðsveteranar úti

Fleiri av teimum, sum annars mugu roknast millum álitini á liðnum, eru nevnliga burturi frá við skaða í løtuni. Nøvn sum Jens Kristian Hansen, Jóhannis Joensen, Allan Mørkøre og John Petersen eru avgjørt leikarar, sum høvdu verið fastir fúsir á flestu liðum í landinum, men eingin teirra verður so við sunnudagin.

Fram til hóskvøldið var annars ein vón um, at John Petersen kundi verða tøkur, men í samráð við fysioterapeturnar varð avrátt, at tað ráðiligasta var at bíða enn eina viku.

Tað merkir so við øðrum orðum, at B36 má royna seg við eitt sindur yngri kreftum, og í steypakappingini hevur hetta so ikki verið tann heilt stóri trupulleikin. Serstakliga tí liðið í verjupartinum tykist hava hópin av leikarum at seta inn. Og at verjan – hóast omanfyristandandi fráveru – helst fer at telja Egil á Bø, Pól Thorsteinsson, Arnbjørn Danielsen og Kenneth Jacobsen borgar frá eini góðari breidd. Hvussu liðið so mannar álopspartin uttan John Petersen, er eitt annað mál, og her kundi tað bent á, at talan verður um eina uppstilling við Bárði Mortansson og dos Santos í álopinum.

### Strævin dystarskrá

Í EB/Streymi mundu tey puffa nakað, tá tað stóð greitt, hvussu landskappingin varð løgd til rættis.

B36 úti, HB heima og KÍ úti eru í øllum førum dystir, sum kunnu skapa ótta fyri eini strævnari byrjan, og tá ein útidystir móti HB í steypakappingini so eisini stendur á skránni, tykist byrðan á ongan hátt at gerast lættari.

Hinvegin, so kann eisini hugsast, at hetta kann virka til at geva samansetta liðnum eina frálíka byrjan. Í fjør vunnu teir báðar landskappingardystirnar móti B36. Teir hava vanliga sera góð úrslit á heimavølli móti HB, og tó at teir í fjør taptu greitt fyri KÍ, so hava klaksvíkingar eisini nøkur ring minni um EB/Streym.

Tí er als eingin orsøk hjá leikarunum at fella í fátt longu undan dystinum, og tað munnu teir sum so heldur ikki gera. Einasta ivamálið undan vikuskiftinum hevur Verið Jákup Martin Joensen, men tá vit frættu, varð tó roknað fyri víst, at hann fór at verða tøkur.

Og so er spurningurin bara, hvørt EB/Streymur aftur í ár skal skelka høgt miðandi árstalsfelagið, ella um talan hesaferð verður um sigur til liðið, sum á pappírinum tykist vera tað sterkara.

### Hjalgrím skoraði á 2. liði



Hjalgrím Elttør skoraði í mikukvøldið mál fyri Fremad Amager. Men tað var ikki á besta liðnum í felagnum, at hann spældi. Hann var við á 2. liði hjá Fremad Amager, sum spælir í Keypmannahavnarseriuni.

Fremad Amager spældi ímóti Rødovre og vann 3-2. Stutt eftir hálvleikssteðgin skoraði Hjalgrím Elttør til 2-1 til Fremad Amager. Liðið liggur sum nummar 6 í tí, sum verður rópt Keypmannahavnarseriuni, og venjari hjá liðnum er fyrrverandi B68- og HB-venjarin, Frank Skytte.

Hjalgrím Elttør hevur ikki verið við á besta liðnum hjá Fremad Amager seinastu tvær ferðirnar, tí hann hevur havt ein skaða at dragast við.

**-ek**

### FCK-málverji misnøgdur

Ungarski málverjin í FC Keypmannahavn, Balázs Rabóczki, vil sleppa at spæla fyri eitt annað felag sum skjótast. Hann hevur seinastu tíðina verið eykamálverji í FCK, og tað er hann troyttur av.

– Eg tími hetta ikki meira. Eg royni nú at sleppa burtur frá FCK sum skjótast, og eg vóni, at kann fáa loyvi til tað. Eg havi fleiri ár eftir av sáttmálanum enn, men hetta bar ov tyngjandi fyri meg, sigur Rabóczki við Ekstrablaðið.

Hann sigur, at venjarin hjá FCK, Hans Backe, í longri tíð hevur ignorera hann.

– Hann tosar við allar spælararnar í hópinum uttan meg. Hann hyggur ikki upp á meg, sigur einki, og eg fái onga frágreiðing um, hví eg ikki sleppi at spæla, sigur málverjin.

**-ek**

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL



*Ógloymandi borðhald og*
**SPENNANDI ÚTFERÐIR**
*29. mai*

**Vit stíla fyri:**
· Útferð
· Stórari "fjalla"-buffet
við meira enn 30 ymsum rættum
· Dansi
· Vistarhaldi
· Flutningi

***Eitt framúr gott tiltak - bæði fyri náttúrufólk og fólk í veitslulag -***

Legg saman flutning, útferð, "fjalla"-buffet, gisting og dans og tú fært:

***Eina ógloymandi vikuskiftisútferð***
**fyri 695,-**
í dupultkamari
v/ gisting og flutningi úr Havnini

Vel ímillum hesar útferðir:
- Gongutúr niðan á Egg
- Gongutúrur til Gásadals
- Gongutúr til Bøsdalafoss
- Siglitúr um Tindhólm (100,- kr. eyka)

*Allir túrarnir eru við ferðaleiðara*

Nýtt í ár! • Nýtt í ár! • Nýtt í ár!
**Útferð til Mykinesar við tyrluni**
t/r uml. 2 tímar
**650,- kr. eyka**
Bert galdandi um nóg nógv tekna seg!



**Showmenn**
v/ Kim Hansen, Jens Marna Hansen, James Olsen og Jóhannus á Røgvi
**undirhalda og spæla til dans**

**Útferð, borðhald og dansur**
**325,-**

**Dansur 125,-**

Útferðirnar byrja kl. 13.00
Borðhaldið byrjar uml. kl. 19.00
Dansur er frá kl. 23.00
***Bíleggið í góðari tíð á tel 33 29 55***
***- avmarkað atgongd -***

***Eisini fyriskipa vit útferðir fyri virki og feløg***
***Ring og hoyr nærri!***

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo

team85